†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum,
at elskaða kona mín, mamma, vermóður, omma
og langomma okkara

**Kirsten F. N. Rasmussen, Tórshavn**

fødd Olsen, ættað úr Leirvík

andaðist hósdagin 27. januar á Landssjúkrahúsinum,
85 ára gomul.
Farið verður úr kapellinum á Landssjúkrahúsinum
sunnudagin 30. januar kl. 17.00.
Jarðarferðin verður mánadagin 31. janaur kl. 13.00
úr Havnar kirkju.

*Familjunnar vegna*

**Nicodemus, Oddmar, Suni, Ólavur, Jonna Kathrina og Ninny**

Tey, ið vilja minnast Kirsten við blómum ella kransi, kunnu í staðin lata KFUK í Havn eina gávu á konto í Føroya Sparikassa.

## Tøkk

Vit takka hjartaliga øllum tykkum,
sum sýndu samkenslu og vóru um okkum,
sendu heilsanir, blómur, kransar og gávur,
tá ið okkara góði elskaði maður, pápi, sonur og beiggi

**Klæmint Olsen**

Tórshavn

brádliga doyði og varð jarðaður.

Tøkk til prest, sangarar og øll tykkum, ið veittu okkum
stóra og góða hjálp við jarðarferðina.
Tøkk øll tit, ið fylgdu Klæmint til hansara
seinastu hvíld.

*Vegna tey avvarðandi*

**Ragnhild, Elisabeth, Annika og Sunniva**
**og**
**Elisabeth**

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum sýndu samkenslu,
tá okkara elskaði sonur og beiggi

**Jákup Øster Joensen**

Tórshavn

doyði og fór til gravar.

Takk fyri blómur, kransar og gávur.
Vit takka øllum, sum ringdu, skrivaðu og komu inn
á gólvið bæði heima og á Landssjúkrahúsinum.
Vit takka øllum, sum bóru okkum ígjøgnum svárar
dagar, og sum framvegis á so mangan hátt
stuðla okkum í sorgini.
Tøkk tit ungu, sum á tykkara serstaka hátt
ugga okkum.

**Erling og Berit**
**Lydia og Kári**
**Bjarki, Tróndur, Magnus, Lea og Barbara**

# Adelborg Linklett

## Ung kvinna fyllir 70



Leygardagin 29. januar fyllir ein vælkend kvinna sjeyti.

Tað er nevniliga Adelborg Linklett í Klaksvík.

At henda vinkona nú fyllir 70 er ófatuligt – og man stendur spyrjandi: "Kann tað bera til" – hetta lívstykkið – hendan "humørbumba" – hendan vakurleikadrotning – og fram um alt – hendan megnar sjónleikarkvinna, ið ber seg so væl.

Kom at kenna Adelborg rættiliga tíðliga, tá ið vit vóru til "skips" saman við gl. Sjúrðarberg í Grimsby. Vit vóru í Onglandi og seldu fisk – og gjørdu nakrar umvælingar á skipið – so vit vóru nakrar dagar saman í Grimsby. Tað var nevnliga so, at Kiss var telegrafistur – so har var nógvur látur – tí stuttligari mann kanst tú neyvan finna.

Tað sum eg minnist best til hendan túr, var at vit vóru í Cleedtorp, og Adelborg lærdi meg at dansa. Eisini var systurdótturin Helma við á túrinum.

Tað var ógloymandi.

Seinni kom eg at kenna Adelborg væl – og var hetta gjøgnum sjónleik.

Tað byrjaði í 1977, tá ið Klaksvíkar Sjónleikarafelag var endurstovnað og vit spældu KARL XII.

Seinni bleiv tað til nógvar leikir: Landastrokið, Fríggjarafløkjan, Heiðursborgarar, Delerium Bubonis og aðrir.

Tað hevur altíð verið ein fragd at spælt saman við Adelborg, tí sjónleikari er hon ein av okkara bestu – og tú skal ikki vera bangin fyri, at tú ikki fær "respons", tá ið tú er á palli saman við henni. Hon gongur 100 prosent upp í sín leiklut – men er ikki bangin fyri at hjálpa øðrum á palli, um tey ivast og ikki føla seg væl. Hon hjálpir teimum at "finna" persónin.

Er Adelborg ófør á palli, ja, so er hon ikki minni ófør handan leiktjøld.

Tað er ótrúligt, hvat hon kann finna upp á – finna lutir (rekvisittir) – og tað hevur verið so, at um onnur feløg – eitt nú Havnar Sjónleikarafelag ella Gríma, standa og mangla okkurt og ikki kunnu finna tað, so er bara at ringja til Adelborg. Eigur hon tað ikki sjálv – ja, so skaffar hon tað.

Síðan Klaksvíkar Sjónleikarafelag var endurstovnað í 1977, hevur Adelborg tey allarflestu árini sitið í nevndini, mest sum formaður – og tað má hon hava verið eini 20 ár tilsamans.

Eg taki ikki munnin ov fullan, tá ið eg sigi, at har hevur Adelborg verið "primus motor" – og uttan Adelborg hevði einki sjónleikarafelag verið í Klaksvík í dag. Tað er heilt ótrúligt, hvat hon hevur verið fyri hetta felag.

Eitt annað er – og sum vit ofta flenna at – er at finna leikarar. Hon kann "finna" tey mest ótrúligu fólk at spæla sjónleik, fólk, sum tú ikki hevði droymt um, kundu ella vildu spælt sjónleik. Tey kemur Adelborg "dragsandi" við – og eru eisini blivin eitt stórt "aktiv" hjá felagnum.

Hin 12. mars 2004 fekk Adelborg "Herðaklappið" frá Leikpalli Føroya, og hevur nakar innan fyri sjónleikaraverðina í Føroyum uppiborið hendan heiður, so er tað Adelborg. Vit, sum kenna Adelborg frá sjónleikaraheiminum, vóru sera glað um hetta val.

Góða vinkona, eg kundi skrivað nógv afturat (vit blása upp á tygara harur/nú fari eg eftir lyklinum til vínkjallaran o.s.v.) – men hetta verður okkara millum.

Vil so fegin ynskja tær hjartaliga tillukku – og at tú fær nógv góð ár afturat saman við Kiss, synunum, ommubørnunum og langommubørnunum.

Eg og mong við mær eru glað fyri, at vit lærdu teg at kenna og kunnu rokna okkum upp í tín stóra vinaskara.

**Jógvan E. Ósá**

# Vestmannaoyggjar á gosi

TÓNLEIKUR
*tíðindaskriv*

Ferðin til Íslands á festival í Vestmannaoyggjunum, sum GRÓT skipaði fyri við bólkunum SIC og Ólavi og Torfinni úr Gestum seinasta vikuskifti gekk frábera væl.

Onnur kend nøvn spældu eisini á festivalinum, millum hesi frálíku vóru Hoffmann, sum vitjaðu G! Festival seinasta ár og so super 68ara bólkurin Brain Police. Hesir teljast báðir millum heilt væl umtóktu bólkarnar í Íslandi fyri tíðina.

Frásøgumaður á tiltakinum var hin væl kendi Ólipalli frá Rás2 hjá íslendska Ríkisútvarpinum.

Framførslan hjá Ólavi og Torfinni var sera væl móttikin og fólk sótu hugtikin og lýddu á vøkru sangirnar, framførdar einans við kassaguitarum og sangi. Løgini vóru nøkur vit kenna frá Gestum, okkurt spildur nýtt og so eitt Clickhazelag, sum Ólavur var við til at skriva og synja við bólkinum tann tíð tað var.

Sic setti veruliga lív í áhoyrarafjøldina og vóru avgjørt millum best dámdu bólkarnar hetta kvøldið. Ja, satt at siga vóru Vestmannaoyggjar á gosi hesa løtuna meðan Sic við sínum orkuløðda og grótharða tónleiki lótu føroyskt tónleikalava goysa úr sær.

GRÓT hevur fyrr skipað fyri íslandsferðum og hesin táttur fer væntandi framyvir at verða tikin upp í størri mun enn áður. Tað er upplagt fyri føroyskar bólkar at royna seg í Íslandi og íslendsar bólkar at royna seg í Føroyum.


